# Ríkissjúkrahúsið er neyvan besta og rætta viðgerðarstaðið fyri allar sjúkur

**- Sum mannagongdin er, verða sjúklingar, sum fyrst einaferð eru sendir á Ríkissjúkrahúsið, innkallaðir aftur ár eftir ár og hava nærum einki við føroyska sjúkrahúsverkið at gera. Hetta verður gjørt, hóast talan er um ambulantar kanningar, sum eins væl kundu verið gjørdar í Føroyum, sigur Rúna Sivertsen, løgtingskvinna**

SJÚKUVIÐGERÐ
*Vilmund Jacobsen*





*- Føroyskir sjúklingar eiga at verða sendir til tey sjúkrahús í heiminum, har sakkunnleikin í hvørjum einstøkum føri er størstur, heldur Rúna Sivertsen, løgtingskvinna, sum hevur sett Bill Justinussen, landsstýrismanni, fýra fyrispurningar um sjúkuviðgerð*

Rúna Sivertsen, løgtingskvinna, hevur sett Bill Justinussen, landsstýrismanni, fýra skrivligar fyrispurningar um viðgerð av sjúklingum uttanlands.

Spurningarnir vórðu bornir niðan í tingið týsdagin, og í gjár skuldi løgtingið atkvøða um, hvørt landsstýrismaðurin skuldi svara spurningunum hjá løgtingskvinnuni.

Í fyrsta lagi spyr Rúna, um landsstýrismaðurin hevur trygd fyri, at tær eftirkanningar, sum Ríkissjúkrahúsið kallar inn til, veruliga eru neyðugar og bara kunnu gerast á Ríkissjúkrahúsinum.

Í øðrum lagi spyr hon, hvat eftirlit er við, at mest møguligt fæst fyri peningin, sum heilsuverkið rindar Ríkissjúkrahúsinum.

Í triðja lagi vil hon hava at vita, nær føroyskir sjúklingar fara at verða sendir til bestu viðgerðarstøð í heiminum.

Í fjórða lagi verður spurt, um Almanna-og Heilsumálastýrið hevur gjørt kostnaðar- og nyttukanningar av sjúkuviðgerðum, ið neyðugar eru at gera uttanlands.

### Ár um ár

Í viðmerkingum sínum til fyrispurningarnar, vísir Rúna Sivertsen á, at tá ið sjúklingar verða sendir til viðgerðar á Ríkissjúkrahúsinum, verður hetta gjørt eftir tilmæli frá einum yvirlækna. Síðan rindar føroyska heilsuverkið kostnaðin av viðgerðini.

- Sum mannagongdin er, verða sjúklingar, sum fyrst einaferð eru sendir á

Ríkissjúkrahúsið, innkallingar frá RS ár eftir ár og hava nærum einki við føroyska sjúkrahúsverkið at gera. Hóast talan er um ambulantar kanningar, sum eins væl kundu verið gjørdar í Føroyum, verða sjúklingar áhaldandi sendir niður á Ríkissjúkrahúsið.

Løgtingskvinnan sigur seg ivast í, um føroyska heilsuverkið hevur neyðugu trygdina fyri, at hetta altíð er besta loysnin, bæði tá ið tað snýr seg um viðgerð og prísin fyri tænastuna.

- Ríkissjúkrahúsið hevur stóran serkunnleika, men er neyvan besta og rætta viðgerðarstaðið fyri allar sjúkur. Hóast hetta, hava vit bert avtalu um at senda sjúklingar hagar.

Rúna heldur, at vit óivað høvdu fingið eina betri tænastu og meira fyri peningin, um støða í hvørjum einstøkum føri varð tikin til, hvar best hóskandi viðgerðarstaðið er.

- Men ein slík meting kann best takast út frá eini kostnaðar-og nyttugreining, leggur hon aftrat.

### Hugsa longur

Í viðmerkingum sínum, vísir løgtingskvinnan á, at tað er serstakliga kostnaðarmikið at senda fólk av landinum til viðgerðar, tí umframt sjálva viðgerðina, kemur kostnaðurin av ferðaútreiðslum og vistarhaldi á Hotel Tórshavn.

- Tí er alneyðugt, at eftirlit er við, hvussu vit fáa mest fyri peningin, sum vit í dag rinda til Ríkissjúkrahúsið - og í framtíðini vónandi eisini til onnur sjúkrahús.

Hon heldur, at tað, sum hevur allarstørsta týdning, er, at føroyskir sjúklingar í framtíðini verða sendir til tey sjúkrahús í heiminum, har sakkunnleikin í hvørjum einstøkum føri er størstur.

- Við teimum samskiftismøguleikum, vit hava í dag, skuldi einki verið til hindurs fyri, at vit hugsa longur enn til Ríkissjúkrahúsið í Keypmannahavn, sigur Rúna Sivertsen, løgtingskvinna, at enda.

# Nýggjur gamal drápsháttur…

ALIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Fiski-og alivinnan eru ógvuliga fjøltáttaðar vinnur og hjá tí, sum skrivar um hendan partin av vinnuni, ber altíð til at skriva um okkurt. Tú kemur ongantíð á mál, og tað verða altíð nógv viðurskifti og nógvir spurningar, tú ongantíð hevur nortið við. Sumt veitst tú um, men røkkur tí ikki, og sumt fært tú ongantíð at vita, tí tú dettur ikki á tey fólk, sum sita við vitanini.

Fert tú á eina fiskivinnuframsýning ella aliframýning uttanlands, er ógjørligt hjá tær at vita, hvat er nýtt innan framleiðslutól, nautiska útgerð, ella hvat tað nú einaferð kann vera. Í slíkum førum er skilagott at halda teg aftrat onkrum, sum umboðar vinnuna - einum virkisleiðara, sum kennur maskinurnar og nýggju tøknina ella skipara, sum kennir nautisku tólini á eini skipsbrúgv.

Í blaðnum týsdagin endurgóvu vit partar av eini grein í norskum blaði um ein nýggjan sláturhátt innan alivinnuna.

Sláturhátturin snýr seg um, at laksurin verður niðurkøldur fyri slakt, soleiðis at fiskurin gerst minni strongdur. Við at køla fiskin niður og minka um strongdina, leingist tíðin, til deyðsstívleikin kemur í fiskin, og hann gerst stívur og ringur at arbeiða.

Í greinini í norska blaðnum varð víst á, at norski ídnaðurin á henda hátt hevur eitt fleiri dagar langt "forspring" mótvegis øðrum kappingarneytum, tá ið ræður um feskleika og dygdir sum fastleika og reyða litin í laksinum.

Eftir at greinin hevði staðið í Sosialinum, ringdi ein kelda til okkara, sum hevur stóran kunnleika innan føroysku alivinnuna.

- Eg mátti flenna, tá ið eg las greinina um nýggja sláturháttin hjá norðmonnum, tí soleiðis hava føroysk alibrúk dripið laks í fleiri ár.

Keldan helt tó, at hugskotið kemur úr Noregi, men at hetta er ein nýggjur sláturháttur, er tað reina vrøvl.

Og soleiðis er við øllum tí, sum hevur við fisk og fiskivinnuna at gera. Tú verður ongantíð nóg væl kunnaður á øllum økjum, tí vinnan er so ógvuliga fjøltáttað, úr einum enda í annan.

Helst hevur norski greinskrivarin misskilt okkurt, og vit kunnu gita okkum til, hvat tað er, hann hevur misskilt.

Norski granskarin, Per Olav Skjervold, hevur arbeitt við spurninginum um feskleika í laksi fleiri ár, og hesin hevur nú skrivað eina doktararitgerð um evnið.

Tað er ivaleyst i hesum sambandi, at norski greinskrivarin metir, at hátturin við niðurkøling av laksinum fyri slakt, er nýggjur og higartil lítið kendur millum alarar.

Men so er ikki, skilst.



# Positivt prát

**Allir flokkar á tingi hava játtað at tosa við Kári Davidsen. Hann heldur, at prátið higartil hevur verið ógvuliga positivt**

SAMKYND
*Heri á Rógvi*



*Bogi Davidsen og Søren Nielsen skulu ella hava verið á fundi við allar teir politisku flokkarnar í Føroyum. Her er tað Javnaðarflokkurin, ið eigur tørn*

*Mynd: Finnur Justinussen*

Bogi Davidsen, sum er samkyndur, er í Føroyum í hesum døgum, og hann hevur á ferðini sett sær fyri at tosa við allar teir politisku flokkarnar í Føroyum. Hetta ger hann saman við Søren Nielsen, sum hann livir saman við í samkyndum parlagi í Danmark.

Higartil letur Bogi væl at fundunum.

Týsdagin hitti hann Sambandsflokkin, Javnaðarflokkin og Sjálvstýrisflokkin. Mikudagin er tað Fólkaflokkurin og partar av Landsstýrinum. Mikudagin ella hósdagin skal hann eisini á fund við Tjóðveldisflokkin og Miðflokkin.

– Føroysku politikararnir fáa møguleikan at hitta samkynd fólk. Eg og Søren greiða frá okkara støðu, og politikararnir hava møguleikan at spyrja tað, teir vilja, sigur Bogi Davidsen.

At betra um kjaka vónar Bogi verður ein av fylgjunum av prátinum við politikararnar.

Bogi er dagligt lækni í Danmark, men hann hevur ikki hug at flyta til Føroya at búgva, sum støðan er nú.

– Í Danmark eri eg bara lækni og livi eitt vanligt lív. Tað er kortini eingin, sum er eftir mær í Føroyum, men tað er munur rættindunum í Føroyum og í Danmark, sigur Bogi Davidsen.

Jenis av Rana um skrásett parlag:

# Kjakið órógvar

**– Kjakið um skrásett parlag skapar øsing og spjaðing í Føroyum. Tað er óneyðugt, tí málið vinnur ongantíð frama í verandi samgongu, sigur Jenis av Rana, tingmaður fyri Miðflokkin**

SKRÁSETT PARLAG
*Heri á Rógvi*



*Jenis av Rana vil ikki hoyra talan um, at bíbilskir sannleikar verða kjakevni í Føroya Løgtingi*

Jenis av Rana, tingmaður og formaður fyri Miðflokkin, heldur, at málið um skrásett parlag hevur skapt óneyðuga øsing og spjaðing í Føroyum.

Ábyrgdina fyri fyri hetta – sambært Jenis av Rana – hevur Høgni Hoydal, landsstýrismaður í lógarmálum.

– Hetta málið byrjaði ikki á berum, men tað var Høgni Hoydal, ið byrjaði hetta málið. Hann hevur megnað at øsa fólk móti hvørjum øðrum. Hann eigur sjálvur alla ábyrgdina, sigur Jenis av Rana.

Bill Justinussen, landsstýrismaður fyri Miðflokkin, Høgni Hoydal og Jenis sjálvur vóru fyri góðum tveimum vikum síðani á einum óformellum fundi, har teir báðir úr Miðflokkinum heittu á landsstýrismannin í lógarmálum um at halda eitt sindur aftur við málinum, tá arbeitt verður við málinum, og tað liggur væntandi langt frammi í tíðini. Teir gjørdu støðuna hjá Miðflokkinum greiða.

Jenis kallar støðuna fyri tragiska, sum hon hevur útviklað seg.

– Tað tykist sum um, at hetta er tað einasta, hann hevur eftir. Vit eru førd tættari at ES, og vit hava givið dønum 366 mió. kr av livigrundarlagnum í Føroyum. Prísurin hevur verið alt ov dýrur, sigur Jenis av Rana.

Sjálvur hevur Høgni Hoydal áður greitt frá, at hann ætlar at leggja tey mál fram, sum skulu vera við til at tryggja rættartrygdina í Føroyum. Serliga tá hugsað verður um, at politiska ætlanin er at gera Føroyar meira sjálvbjargnar, og hetta merkir m.a., at eitt lógarverk verður skapt fyri føroyska samfelagið.

Jenis av Rana fílíst ógvuliga nógv á, at vit í Føroyum umhugsa eina danska lóg, sum er púra greitt ímóti siðvenjuni og mentanini í føroyska samfelagnum.

– Vit roknaðu avgjørt við, at vit fingu føroyskar lógir á hesum økinum heldur enn danskar, sigur Jenis av Rana.

### Støðan greið

Hjá Jenis av Rana og Miðflokkinum er støðan um skrásett parlag ógvuliga greið.

– Fyri okkum er tað so sera einfalt: Har bíblian er greið – og tað er møguliga støð, har hon ikki er greið – men tá hon er greið, tá ber ikki til at kjakast um hana. Tað er okkara tykki fullkomiliga skeivt, at tað føroyska tingið skal fara at kjakast um, hvørt tað er rætt, hvat bíblian sigur. Tað, sum bíblian sigur, skal bara yvirhaldast, heldur Jenis av Rana.

Tingmaðurin fyri Miðflokkin avvísir staðiliga, at teirra støða er ódemokratisk.

– Tað er júst demokrati, tá tú ger eina samgongu, sum er samd um ein politikk, men er kanska ósamdir um onkur mál, sigur Jenis av Rana,

Eitt lógarmál um skrásett parlag verður als ikki borið í tingið í verandi samgongu. Hetta ger Jenis av Rana greitt.

– Tað kann vera, at tað verður borið í niðan í tingið til eitt aðalorðaskifti ella sum eitt familjumál, men ikki sum eit lógarmál við verandi samgongu, sigur Jenis av Rana.

### Nøgdur við samgonguna

Hóast stevið og orðingarnar eru farnar nakað av leið hesa seinastu tíðina, so er Jenis av Rana kortini væl nøgdur við samgonguna – hina fyrstu við Miðflokkinum – sum nú hevur meira enn fýra mánaðir á baki.

Jenis letur væl at, og hann roknar eisini við einari greiðari semju um fíggjarlógina, nú hon skal samtykjast í næstum.

Jenis er tó skuffaður av, at málið um skrásett parlag ikki varð nevnt við einum orði í samgongusamráðingunum. Hann sigur seg vera púra vísan í, at Tjóðveldisflokkurin ikki hevði kunnað farið í verandi samgongu, um hann hevði greitt frá hesum frá byrjan, og kravt tað við í samgonguskjalið. Hann metir tað harumframt vera lítið sannlíkt, at nakar annar flokkur uttan Javnaðarflokkurin hevði farið í eina samgongu, har skrásett parlag var í samgonguskjalinum.

– Á hesum økinum við m.a. skrásettum parlag kann samgongan skjótt fáa ein trupulleika, sigur Jenis av Rana.

Hann leggur dent á, at Miðflokkurin ætlar sær ikki úr nakrari samgongu, men málið kann gerast ein trupulleiki fyri avvarðandi landsstýrismann og samgonguna.

Undir tí teiginum, ið kallast fyri ríkisrættarliga støðan í samgonguskjalinum, stendur at lesa, at samgongan ætlar at yvirtaka »Familjurættarmál«. Seinni í samgonguskjalinum stendur at lesa: »Allar yvirtøkur verða neyvt fyrireikaðar í samskifti við allar avvarðandi partar og neyvar umsitingar- og fíggjarætlanir gjørdar og lagdar fyri Løgtingið, áðrenn yvirtøkan verður framd.«

Og í sama sam-gonguskjali stendur at lesa:

»at tað verður Løgtingið, sum ger av, at øll málsøki, undantikið tey, sum eru knýtt at suverenitetinum, kunnu yvirtakast sum sermál«.

## Yvirlýsing frá Føroya Javnaðarflokki

Vísandi til úttalilsið hjá Gerhardi Lognberg í Sjónvarpi Føroya týsdagin 13. okt. víðvíkjandi leikinum »Ginusøgur«, verður gjørt vart við, at hetta er ikki í tráð við almenna mentanarpolitikkin hjá flokkinum.

Tvørturímóti vil Javnaðarflokkurin skapa vøksturlig umhvørvi fyri einum virknum frílyntum mentanarpolitikki, sum byggir á víðskygni og tolsemi.

**Føroya Javnaðarflokkur**
**14. okt. 2002**